# BILAR

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Ársins bilur í Danmark 2008




*Formaðurin fyri Motorjournalisternes Klub Danmark, Finn Knudstrup (v.m.), og Nils Nyrup, stjóri í Mazda Motor Danmark, við ársins bili í Danmark*

Ein dómsnevnd sett saman av 31 donskum motorjournalistum hava kosið nýggja Mazda2 sum »Årets Bil i Danmark 2008«.

Bilarnir vórðu royndarkoyrdir á FDM Jyllands-Ringen. Nummar 2 var Kia Ceed og nummar 3 var Ford Mondeo.

Samstundis handaði Motorjournalisternes Klub Danmark heiðursløn til Kia fyri at geva 7 ára garanti upp á Kia Ceed.

**mg**




*Ársins bilur í Danmark 2008, Mazda2*

## Kia Ceed heiðraður



*»Motorjournalisternes Klub Danmark« heiðraðu Kia fyri at geva 7 ára garanti upp á Kia Ceed*

# Nýggjur Peugeot Bipper í 2008

PSA Peugeot Citroën hava í samstarvi við Fiat gjørt eitt heilt nýtt vørubilakonsept.

Talan er um ein kompaktan vørubil, sum er 3,86 m langur og vørurúmið er 2,5 rúmmetrar.

Peugeot útgávan eitur Bipper. Til sammeting kunnu vit nevna, at Bipper er umleið 30 cm styttri enn Peugeot Partner og Citroën Berlingo.

Bipper er serliga gjørdur til fakfolk, sum hava brúk fyri einum løttum og smidligum arbeiðsbili, ið er lættur koyra og lættur at parkera.

Peugeot Bipper verður framleiddur á felags verksmiðju í Turkalandi og væntast á marknaðin í mars 2008.

**mg**




*Peugeot Bipper er ein lættur og smidligur arbeiðsbilur, sum væntast á marknaðin í mars 2008*